

ATLANTIC FAIR 2019

# ÁHUGAVERDAR OG UPPLÝSANDI FRAMLØGUR

**Í døgunum frá 21. til 23. mai verða ikki færri enn 15 áhugaverdar og upplýsandi framløgur á Atlantic Fair í Klaksvík. Tær fevna víða. Her nøkur av heitunum: "Vinnan skal trívast í Klaksvíkar kommunu", "Hví ikki byggja skip í Føroyum við føroyskum fyritøkum?", "Sjóvinnutænastur til altjóða marknaðin", "Pit Stop Føroyar", "Meir enn fiskur", "Skip renna á land – ein vandamikil kós" og "Stuðulsmøguleikar".**

***EFTIR JAN MÜLLER***

FRAMLØGA Á ATLANTIC FAIR TÝSDAG 21. MAI KL. 15

## "VINNAN SKAL TRÍVAST Í KLAKSVÍKAR KOMMUNU"

– Trivnaðurin í Klaksvíkar kommunu byggir í stóran mun á herarnar hjá teimum framskygdu vinnulívsfólkum, sum hava verið í kommununi. Seinastu nógvu árini hevur kommunan so vítt gjørligt roynt at vera ein aktivur viðleikari við at skapa hóskandi karmar. Hetta er eisini málið í framtíðini. **Eirikur í Jákupstovu**, Vinnu- og mentanarstjóri leggur fyri.



FRAMLØGA Á ATLANTIC FAIR TÝSDAG 21. MAI KL. 16:

# “HVÍ IKKI BYGGJA SKIP Í FØROYUM VIÐ FØR-OYSKUM FYRITØKUM?”

-Seinastu seinastu árini hava okkara grannalond bygd ein hóp av skipum. – Komandi árini skullu føroyingar hava fleiri nýggj skip. Hvørjir møguleikar og forðingar eru fyri at hesi verða smíðað í Føroyum av føroyskum fyritøkum? **Frimodt Rasmussen** og **Sofus Gregersen**, KSS, (Klaksvíkar Sleipistøð)





FRAMLØGUR OG KJAK Á ATLANTIC FAIR MIKUDAG 22. MAI KL. 10.30 – 12.30:

# FØROYAR SUM TÆNASTU- OG TILFEINGISDEPIL Í NORÐURATLANTSHAVI

Grundarlag og bakgrund: Við vaksandi virksemi norðan fyri Føroyar - við nýggjum siglingarleiðum í Arktis, sum eru opnar størri part av árinum – og við vaksandi virksemi sunnan fyri Føroyar, nú oljuleiting og útbyggingar alsamt førka seg henda vegin – koma Føroyar brádliga í eina nýggja støðu sum framtíðar tænastu- og tilfeingisdepil í Norðuratlantshavi.

Møguleiki er fyri – um vit bera okkum rætt og skjótt at og eru kappingarfør - at eftirspurningurin eftir føroyskum vørum og tænastum fer at vaksa munandi. Men hvussu skulu vit fyrihalda okkum til hesar nýggju møguleikar og avbjóðingar í kjalarvørrinum á einum vaksandi virksemi bæði fyri norðan og sunnan í Atlantshavi! Hvat hava vit at bjóða fram og hvørjar eru fortreytirnar fyri, at Føroyar kunnu gerast eitt "pitstop" – miðdepil ella steðgipláss – í Norðuratlantshavi fyri alskyns vinnum tað verið seg innan shipping og flutning sum heild, veiting av vørum og tænastum til eitt nú olju- og gassleiting og framleiðslu, móttøku av ferðamannaskipum osfr. Hvussu troyta vit skilabest tær mongu útbyggingar, sum eru gjørdar í havnir og mongu ymsu fasilitetirnar á landi.

Ikki einans í Føroyum eru eygu vend móti hesum nýggju møguleikum. Tí eisini okkara grannar bæði fyri norðan og sunnan, Ísland og Skotland, standa fyri somu spennandi avbjóðingum. Tí verður tað nú fyrireikað ein spildurnýggj havn á norðureysturlandinum í Íslandi at taka sær av ferðsluni til og úr Arktis. Og í Skotlandi eru býir sum Aberdeen og Scrabster av álvara farnir at gera stórar havnaíløgur fyri nettupp at fáa lut í m.a. vaksandi oljuvirkseminum á Atlantsmótinum vestan fyri Hetland/eystan fyri Føroyar umframt øðrum virksemi.

Spurningurin er, hvat skal til fyri, at Føroyar kunnu taka lut í kappingini um vørur og tænastur og flutningi, sum stendst av vaksandi virkseminum í Norðuratlantshavi.



FRAMLØGA Á ATLANTIC FAIR MIKUDAG 22. MAI KL. 10.30:

# ”SJÓVINNUTÆNASTUR TIL ALTJÓÐA MARKNAÐIN”

- Føroyskt vinnulív hevur altíð havt tætt tilknýti til sjógvin, og tí er eisini náttúrligt at troyta nýggjar møguleikar av tænasuveitingum til skipaferðslu á okkara leiðum og leitivirksemi kring Føroyar. Jórun Gardar, Vinnuhúsið, heldur framløguna.



FRAMLØGUR Á ATLANTIC FAIR MIKUDAG 22. MAI KL. 11:

# "FØROYAR SUM TÆNASTU- OG TILFEINGISDEPIL Í NORÐURATLANTSHAVI"

Føroysku fólkatingsumboðini, Magni Arge og Sjúrður Skaale, greiða frá sínum arbeiði og hugsjónum rundan um Føroyar og Arktis og gera viðmerkingar til vaksandi oljuvirksemið sunnan og eystan fyri føroyska- bretska markið. Eftir tað fáa umboð fyri hinar flokkarnar høvi at siga sína hugsan um somu mál og spurningar. Møguleiki verður so eisini at kjakast um hesi mál.

Síðani hava umboð fyri flokkarnar hvør sína stytri framløgu.



## "UNSPOILD PITSTOP FYRI SKIPAFERÐSLU - BER TAÐ TIL?"

- Magni Arge, fólkatingsmaður hevur framløguna.



## "PIT STOP FØROYAR?"

- Skipaferðslan fer at økjast kring Føroyar. Tað gevur stórar møguleikar til nógvar vinnugreinar. Í Skotlandi gera tey seg út til at lofta hesum vøkstri. Í Íslandi tað sama. Men Føroyar liggja kanska best fyri. Eru vit nóg áhugað í kappingini? Eru vit nóg væl við í henni?
Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður.



FRAMLØGA Á ATLANTIC FAIR 22. MAI KL. 14

## "MEIR ENN FISKUR"

- Sjóvinnan hevur sera stóran týdning fyri Føroyar. Samstundis liva vit ikki av breyði og fiski eina. Í 100 ár hevur Sjómansmissiónin virkað millum sjófólkið, bæði handaliga og andaliga. Hvat er – og hvat verður gjørt? Torleif Johannensen, sjómanstrúboðari greiðir frá við orðum, myndum og video.



FRAMLØGA Á ATLANTIC FAIR MIKUDAG 22. MAI KL. 15

## "SKIP RENNA Á LAND – EIN VANDAMIKIL KÓS"

- Hví renna so nógv føroysk skip á land, og hvat ætlar Sjóvinnustýrið at gera við hetta? Hans Johannes á Brúgv, stjóri.

---

FRAMLØGUR Á ATLANTIC FAIR HÓSDAG 23. MAI 2019 FRÁ KL. 10.30 – 15.00:

# "STUÐULSMØGULEIKAR Á BREDDANUM"





Fiskivinnuroyndir, Vinnuframi og Granskingarráðið vera á bási D-306
Hetta eru føroyskar stuðulsskipanir, ið veita fíggjarligan stuðul til gransking, menning og nýskapan.

Stuðul slóðar fyri og ger tað møguligt at menna tøkni og framleiðslu innan allar vinnugreinar. Eisini kann stuðul tryggja fíggjarliga grundvøllin í sambandi við útbúgving av granskarum.

Hósdagin 23. mai verða framløgur og prát um føroysku stuðulsskipaninar og um møguleikarnar hjá føroyingum at søkja um stuðul úr norðurlendskum og evropeiskum stuðulsskipanum.

**Stuðul til einstaklingar**
Fyrrapartin verður dentur lagdur á stuðul til einstakan umsøkjara. Her verður greitt frá tilgongdini at søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum, um hvussu íverkseti kann søkja um stuðul úr Vinnuframa og um, hvussu farast skal fram, tá ið søkt verður um stuðul úr Granskingargrunninum til eina vinnu-ph.d. verkætlan. Fleiri føroyskar fyritøkur hava fingið stuðul úr ES stuðulsskipanini, Horizon 2020. Greitt verður frá SME Instrument, sum er ætlað serliga til smáar fyritøkur og samrøða verður við umboð fyri fyritøkuna GreenIQ, sum hevur megnað at fáa stuðul til kervi at skilja vatn og olju.

**Stuðul til samstarv**
Seinnapartin verður sjóneykan sett á luttøku í størri altjóða netverkum. NORA, Norrønt Atlantssamstarv, fer at greiða frá um luttøku í norðurlendskum samstarvsverkætlanum og um NPA, Northern Periphery and Arctic Programme. Granskingarráðið fer at siga frá um føroysku luttøkuna í Horizon 2020 og um NordForsk, sum fíggjar og samskipar gransking og granskingarinfrakervi í Norðurlondum. Greitt verður frá um NordForsk verkætlan, sum Fiskaaling luttekur í og um góðu úrslitini hjá Havstovuni í altjóða verkætlanum.

**MØGULEIKAR HJÁ EINSTØKUM UMSØKJARA**
Kl. 10.30 – 12.00

**Fiskivinnuroyndir**
*Jákup Mørkøre*

**Vinnuframi**
*Mathea Hilduberg*

**Granskingarráðið**
*Maria Húsgarð*

**Fyritøkur í Horizon 2020**
*Mathea Hilduberg & Maria Húsgarð*
*Jóhann Fagraklett, GreenIQ*

**Steðgur**

**MØGULEIKAR Í NETVERKUM/ CONSORTIUM**
Kl. 13.30 – 15.00

**Norrønt Atlantssamstarv**
*Jákup Sørensen, NORA*

**Horizon 2020 og NordForsk**
*Maria Húsgarð, Granskingarráðið*

**NordForsk verkætlanin SureAqua**
*Bjartur Jacobsen, Fiskaaling*

**Føroysk luttøka í Horizon 2020**
*Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni*